# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1428.
# Tíðarskeið: 30/7-13/8 - 2014

**Fólk við frá Havstovuni:** Lis Larsen, Luis Ridao Cruz, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á heysti í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt varð vekt, tal og longdarbýti skrásett fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini vórðu magakanningar gjørdar av toski, hýsu og upsa, umframt av øðrum fiskasløgum. Hitin í sjónum varð máldur við miniloggarum.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru av Havnini hóskvøldið 31. juli kl. 21. Vit byrjaðu eystanfyri á Sandoyarbanka og tóku støðir har umleið til vit landaðu mikudagin 6. august í Havn. Síðan tóku vit støðirnar eystanfyri lidnar og meginpartin av støðunum norðanfyri. Vegna sterkan streym tóku vit ikki allar støðir norður/vestur úr Mykinesi og á Mýlingsgrunninum men tók støðir suður-vestur úr Mykinesi í staðin. Landaðu týsdagin 12. august kl. 13 í Havn. Tilsamans vórðu 141 hál tikin, og av teimum vóru 134 góðkend. Veðrið var so ógvuliga gott allan túrin.

**Prøvataking:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan fyri øll fiskasløgini tosk, hýsu og upsa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 15. august. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 1. november.

**Fyribilsúrslit:** Eitt sindur minni var at fáa av toski (12 %), men tað var tó nógv av smáfiski ímillum. Meira var at fáa av hýsu (8 %) og upsa (24 %), har nógvur seiður var ímillum. Nógv meira var at fáa av longu (119 %, Talva 1). Minni var at fáa av makreli, men meira av sild. Onkrar sildir vóru komnar nær gýting (Talva 1). Sera nógv var av smáum svartkjafti nærum allar staðir. Annars verður víst til túrfrágreiðingina fyri túr 1430, har úrslit fyri allan landgrunnin eru víst. Magakanningarnar vístu, at tað var nógv til av smáari nebbasild. Sum nakað nýtt kannaðu vit magar av makreli og sild. Tey høvdu etið reyðæti útiá, meðan tey ótu fiskayngul (hvítingsbróðir og nebbasild) nær við land. Vit fingu tríggjar merktar toskar. Vit fingu nógv av stórari longu, tann størsta var 172 cm long og vigaði 31,050 kg.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur (aldrar) og magar tikin á túri 1428.

| FISKASLAG | KG í 134 hálum í 2014 | Nytrur | Magar | KG í 133 hálum í 2013 | KG per hál 2014/2013 |
|---|---|---|---|---|---|
| UPSI | 18940.752 | 838 | 158 | 15118.170 | 1.24 |
| HÝSA | 8858.481 | 858 | 168 | 8136.034 | 1.08 |
| SVARTKJAFTUR | 8232.638 | 42 | 20 | 5302.218 | 1.54 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 7148.871 | 20 | 20 | 7279.984 | 0.97 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 6959.836 | | | 7854.908 | 0.88 |
| LONGA | 5905.363 | 160 | 4 | 2679.867 | 2.19 |
| TOSKUR | 4800.027 | 853 | 186 | 5422.046 | 0.88 |
| GULLLAKSUR | 3554.147 | | | 1825.387 | 1.93 |
| MAKRELUR | 2241.255 | | 37 | 3536.712 | 0.63 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1214.238 | | | 969.073 | 1.24 |
| HAVMÚS | 1009.839 | | | 1039.666 | 0.96 |
| TUNGA | 815.104 | | | 450.175 | 1.80 |
| HVÍTINGUR | 654.425 | | | 896.918 | 0.72 |
| SVARTKALVI | 617.150 | 10 | 10 | 594.438 | 1.03 |
| SKRAMBUL | 504.122 | | | 355.772 | 1.41 |
| BROSMA | 490.845 | 69 | 2 | 464.543 | 1.05 |
| SILD | 468.410 | 25 | 27 | 249.957 | 1.86 |
| TRANTKONGAFISKUR | 418.443 | | 8 | 974.476 | 0.43 |
| LOLIGO | 402.587 | | | 107.268 | 3.73 |
| BLÁLONGA | 393.853 | | | 213.233 | 1.83 |
| KNURRHANI | 386.744 | | | 622.551 | 0.62 |
| REYÐSPRØKA | 294.431 | | | 275.760 | 1.06 |
| HAVTASKA | 197.129 | | | 328.316 | 0.60 |
| SILVURMURTUR | 193.732 | | | 249.806 | 0.77 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 139.827 | | | 80.115 | 1.73 |
| SKØTA | 134.060 | | | 136.585 | 0.97 |
| LÍTLA BROSMA | 124.572 | | | 102.058 | 1.21 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 92.711 | | | 254.118 | 0.36 |
| HVASSASPREK | 86.273 | | | 37.991 | 2.25 |
| LÝRUR | 80.930 | | | 11.305 | 7.11 |
| TINDASKØTA | 72.225 | | | 83.135 | 0.86 |
| LÁLLA | 71.125 | | | 72.855 | 0.97 |
| ROSSAMAKRELUR | 69.483 | | | 2504.550 | 0.03 |
| SANDSPRØKA | 63.925 | | | 102.344 | 0.62 |
| STEINBÍTUR | 39.460 | | | 19.919 | 1.97 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 39.136 | | | 26.772 | 1.45 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 31.474 | | | 36.845 | 0.85 |
| GLASKVOYSA | 25.846 | | | 30.731 | 0.83 |
| BLÁGÓMUR | 13.410 | | | 10.555 | 1.26 |
| LYCODES ENDIPLEURISTCTUS | 11.377 | | | 0.000 | |
| GLÝSUFISKUR | 10.244 | | | 5.644 | 1.80 |
| KLINGRUSKØTA | 8.812 | | | 0.397 | 22.03 |
| ULVFISKUR | 6.746 | | | 0.000 | |
| JÁKUPSSKEL | 5.344 | | | 4.050 | 1.31 |
| ROGNKELSI | 4.855 | | | 0.000 | |
| BLÁRIDDARI | 3.695 | | | 0.170 | 21.57 |
| LÝSINGUR | 3.235 | | | 0.000 | |
| HUMMARI | 3.058 | | | 0.700 | 4.34 |
| RÆKJA | 0.650 | | | 0.000 | |
| HAVNEBBASILD | 0.345 | | | 0.646 | 0.53 |
| KRØKILSKRUTT | 0.341 | | | 0.000 | |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.097 | | | 0.000 | |
| MURRIKRUTT | 0.008 | | | 0.484 | 0.02 |
| NEBBASILD | 0.005 | | | 0.049 | 0.10 |
| TILSAMANS | 75845.691 | 2875 | 640 | | |

**Viðmerkingar:** Ongar.

Petur Steingrund